# Viðtøkur hjá Giktafelag Føroya

## Navn Felagsins

*Grein 1*

Navn felagsins er Giktafelag Føroya.

## Endamál felagsins

*Grein 2*

Endamál felagsins er, at

1.stk. Veita stuðul til gransking av giktasjúkum.

2.stk. At fremja upplýsingararbeiði viðvíkjandi giktasjúkum og avleiðingum teirra.

3.stk. Kunna veita peningaligan stuðul til ymiskar viðgerðarháttir.

4.stk. Taka lut í norðurlendskum samstarvi.

## Limir felagsins

*Grein 3*

Einstaklingar eins væl og stovnar, fyritøkur ella feløg kunnu gerast limir

## Limagjaldið

*Grein 4*

Limagjaldið verður ásett av aðalfundinum

## Nevndin

*Grein 5*

1 .stk. Felagið verður stýrt av eini 5-mannanevnd og 2 tiltakslimum, ið verður vald á ársaðalfundi.

Av nevndarlimunum skulu minst 3 verða sjúklingar, avvarandi ella serkøn.

2. stk. Nevndin skipar seg sjálv við formanni, næstformanni, kassameistara og skrivara.

3.stk. A Fyri vali standa ávikavist 2 og 3 nevndarlimir.

3.stk B Tiltakslimirnir verða valdir á hvørjum ári.

3.stk C Nevndarlimirnir í bólkunum verða valdir á hvørjum ári.

4. stk. Nevndin hevur tað dagligu leiðsluna av felagnum.

5. stk. Nevndin heldur fund so ofta, formaðurin heldur tað verða neyðugt, ella tá ið onkur av hinum nevndarlimunum ynskir tað.

6.stk. Nevndin er viðtøkufør tá 3 nevndarlimir eru møttir.

7. stk. Nevndin tekur avgerð við vanligum meiriluta. Stendur á jøvnum , er málið fallið.

8.stk. Allar fundarsamtyktir skulu skrivast í fundarbókina.

**Bólkar o.a**

*Grein 6*

1.stk Knýtt at felagnum er ein læknaligur ráðgevi, sum saman við nevndini í hvørjum einstøkum føri ger av, um talan kann verða um peningaligan stuðul

( sí grein 2, 3. stk. )

2.stk Knýtt at felagnum kunnu verða bólkar, sum umboða tær ymisku giktasjúkurnar.

3.stk Ì bólkunum kunnu í mesta lagi verða 3 nevndarlimir og 1 eykalimur.

4. stk Bólkurin hevur eitt høvuðsumboð sum verður nevndur formaður.

5.stk Bólkurin ger eina reglugerð at arbeiða eftir , sum skal góðkennast av nevndini í Giktafelag Føroya.

6.stk Nevndarlimirnir í bólkinum skulu veljast á árliga aðalfundinum. Sí grein 5. 3 stk C.

**Aðalfundurin**

*Grein 7*

1.stk Àrligi aðalfundurin skal haldast í seinasta lagi 30. Apríl.

2. stk. Aðalfundurin verður lýstur í fjølmiðlunum 2 vikur frammaundan.

3. stk. Atkvøðurætt á aðal-og eykaaðalfundi hava allir limir felagsins.

4. stk. Aðalfundaskrá:

1. Val av fundarstóra
2. Frásøgn nevndarinnar frá virki felagsins í farna árinum.
3. Framløga til góðkenningar av grannskoðaðum ársrokniskapi við fíggjarstøðu.
4. Val av nevndar- og tiltakslimum og bólkalimum( samb. Grein 5, 3. Stk. )
5. Val av grannskoðara ( samb. Grein 9, 3. Stk. )
6. Innkomin uppskot.
7. Ymiskt.

5. stk. Aðalfundurin velur ein fundarstjóra, ið skipar fyri, at førd verður fundarbók. Fundarstjórin ger av allar spurningar viðvíkjandi atkvøðugreiðslu og umrødd mál.

6. stk. Uppskot til viðgerðar á ársaðalfundinum, skulu vera nevndini skrivliga í hendi í seinasta lagi 1 viku áðrenn fundin.

*Grein 8*

1.stk. Á aðalfundi verða mál avgjørd við vanligum meirluta.

2.stk. Til at samtykkja avgerðir, sum miða ímóti at broyta lógir felagsins ella at taka felagið av, krevst tó, at í minsta lagi helmingurin av limunum eru møttir á fundi og at avgerðin verður samtykt við 2/3 av teimum greiddu atkvøðunum.

3. stk Er hesin helmingurin av limunum ikki møttur á fundi, og meirluti er á aðalfundinum fyri uppskotinum, skal kallast inn til eykaaðalfund.

4.stk. Á ársaðal- ella eykaaðalfundi kann atkvøða ikki avgreiðast við fulltrú.

## Roknskapur felagsins

*Grein 9*

1.stk. Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið.

2.stk. Allir nevndarliminir skulu undirskriva ársroknskapin.

3.stk. Aðalfundurin velur á hvørjum ári grannskoðara.

## Eykaaðalfundur

*Grein 10*

1.stk. Eykaaðalfundur verður hildin eftir avgerð nevndar ella aðalfundar, ella tá ið 1/3 av øllum limunum krevja tað skrivliga.

2.stk. Nevndin lýsir síðan , áðrenn 8 dagar eru lidnir, til eykaaðalfundin við 8 daga freist á tann hátt, nevndur er í grein 7, 2.stk.

3.stk. Um so er, at tað eru limirnir, ið krevja eykaaðalfundin, skulu teir skrivliga siga nevndini, hvat teir vilja hava til viðgerðar.

4.stk. Avgerðir verða tiknar við vanligum meirluta.

## Avtøka av felagnum

*Grein 11*

Felagið kann takast av á lógliga fráboðaðum aðalfundi, samb. grein 8, 2. stk.

Verður felagið tikið av, skulu ognir felagsins latast Føroya Landstýrið at nýta í samsvari við viðtøkurnar í grein 2.